## EG MEINI TAÐ

# Løgtingsval



SJÓNARMIÐ
*Bárður Olsen*

Løgmaður bagatelliseraði samgongukreppuna og pástóð, at tað bara snúði seg um formalia. Álvaratos hvørjum roynir hann at lúgva fyri? Tað var langt úti. Samgongan hevur spælt fallit. Tað einasta rætta er nýval. Um samgongan skal fáa sítt trúvirði aftur, so skal ein fólkaatkvøða verða í mai ella stutt eftir. Eg eri troyttur av at hoyra um loysing og samband, tað er tíð uppá at finna útav, hvat meirilutin av Føroya fólki vil. Nyrup segði, at skiftistíðin var fýra ár og dermed basta. Av einari ella aðrari grund skilti samgongan tað ikki, tí í langa tíð eftir hetta tosaðu tey um 12 ár. At enda fataði løgmaður tað og avlýsti fólkaatkvøðuna. Um samgongan ikki klárar at semjast um eina fólkatkvøðu, so eigur hon at pakka saman. Alt annað er at halda Føroya fólk fyri gjøldur.

Tað er ringt at spáa um, hvør flokkur vinnur eitt næsta val, men tað verða helst Sambands- ella Tjóðveldisflokkurin. Aftur ein polarisering. Næsta samgonga verður nokk ikki tann sama sum tann núverandi. Sjálvt um Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin standa saman nú, fara teir neyvan at gera tað eftir eitt nýval. Næsta samgongan verður møguliga gjørd millum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Hoyrdi eitt brot frá fólkafundinum, tað var ein blanding av tjóðskaparromantikki og tosi um, at Guð var loysingarmaður. Ein margháttlig blanding. Tað er ongantíð rætt at blanda politikk og átrúnað saman. Tað hevur víst seg at verða ein eksplosivur cocktail.

Hví vil danska stjórnin ikki, at vit loysa? Fái meg ikki at trúgva, at tað snýr seg um økonomi og verjupolitikk. Danir eru nokk bangnir fyri, at Grønland fer at taka loysing stutt eftir, at Føroyar hava loyst. Í sambandi við verjupolitikk, er Grønland nógv týdningarmiklari enn Føroyar. Tað gevur eisini status at eiga heimsins størstu oyggj. Fólkaatvøða var í Føroyum stutt eftir, at Ísland tók loysing. Danir eru bangnir fyri, at søgan fer at endurtaka seg.

Einaferð í framtíðini eiga vit at taka loysing, men tað skal gerast við skili. Tá tað fíggjaliga er forsvarligt at taka loysing. Tjóðskaparromantikkur er kanska ein góð grund fyri at taka loysing, men ikki nóg góð. Tá tað fíggjarligt er óforsvarligt, mugu vit lata verða. Tí tað ber jú ikki til at liva av tjóðskaparromantikki eina.

Er olja í undirgrundini kunnu vit byrja at hugsa um at loysa, men tað snýr seg ikki bara um pengar.

Hvat fer at henda eftir, at vit einaferð hava loyst? Verður tað isolering? Um vit einaferð fara at taka loysing, eiga vit at fara við í ES. Ísland og Noreg fara uppí, so er spurningurin, um vit klára okkum uttanfyri? Tað er kanska eitt sindur tápuligt at taka loysing og so knýta seg uppí ES, men alt er betri enn isolering. Vit eru ein partur av stóru verð og eina at taka eina ábyrgt, sjálvt um vit eru lítil og fáment. Livst so spyrt.

Vikuskifti
Postboks 19, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: birgir@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Birgir Kruse

# Rakstrarmáttur

TÓNLEIKUR
*Birgir Kruse*

»Góðan morgum, Las Vegas«, segði Axl Rose á aldarinnar fyrsta mánadegi. »Eg haldi eg havi sovið í eini átta ár, men nú eri eg aftur frammi.« Orðini fullu á pallinum í the House of Blues í Las Vegas. Og so royndu Axl Rose og nýggju fylgisneytar hansara í Guns N' Roses ljóðútgerðina í samfullar tríggjar tímar. Nú varð klárt at byrja av nýggjum. Og vit kunnu vænta okkum ársins konsert siga ummælarar. Fyrst í Norðuramerika, síðani Suðuramerika og Evropa. Í juni verða teir í Norðurlondum.

Tað var seinrapartin av 80'unum, at amerikanski rokkbólkurin Guns N' Roses kom fram. Axl Rose, hvørs veruliga navn er William Bailey, gjørdist skjótt leiðandi ímyndin av hesum nýskapandi bólki, sum danska rokkalfrøðin Politikens Rock Leksikon skýrir einasta verduga avloysara hjá Rolling Stones.

Guns N' Roses dyrkaðu harafturat eitt ljóð, sum gekk sum fótur í hosu afturvið nýggju talgildu tøknini. Eftir at hava tvíhildið um gamla samgilda plátuspælaran í mong ár – fyrst ein Lenco, síðani Pioneer – var tað ein fløga við Guns N' Roses, ella báðar tvær, sum sannførdu meg um, at rætta ljóðið til rokk, var talgildi fløguspælarin. Og helst ein Sony.

Síðani havi eg hildið meg til hesa tøkni. Rakstrámáttur er orðið, sum ensk-føroyska orðabókin nýtir fyri dynamic. Hetta er kjarnin í bæði tónleikinum hjá Guns N' Roses og tøknini í fløguspælaranum.

Fyrstu fløgurnar eg varnaðist við Guns N' Roses vóru GN'R Lies og Appetite for Destruction. Fyrstu kendu sangir teirra eru eisini av hesum báðum fløgum. Paradise City, Sweet child o'mine og Patience. Hesir vóru fyrstu sangir eg legði í talgildu fløguskuffuna. Ein ljóðmynd, sum hvørki var hoyrd ella sædd áður. Hetta var rakstramáttur. Tá gavst eg at keypa plátur og legði meg eftir fløgum. Árið var 1989.

Men tíðin fór frá Guns N' Roses og grunge tók yvir. Men innan teir fóru í søguna, náddu teir, sambært tíðarritinum Rolling Stone, at spæla fyri størsta áhoyraraskara nakrantíð. Tað var ein konsert, hildin í London í apríl 1992 og send um fylgisvein, Freddy Mercury til minnis. Freddy, sum var sangari í Queen, doyði av eyðkvæmi hin 24. november 1991.

Eisini innan musikkvideo hava Guns N' Roses skrivað søgu. Tað er við sanginum »November Rain«, sum er hin mest ynskti á amerikansku MTV rásini.

Nøkur ár eftir, at fløgan The Spaghetti Incident kom út 1993, syndraðist søguligi rokkbólkurin. Nú var bara sangarin Axl Rose eftir. Einasta, hann hevði at halda seg til, var navnið Guns N' Roses og rætturin at brúka tað. Sigst, at hann nú hevur ført navnið aftur til heiður og æru. Heiðurskrýndur og sigursælur, vilja amerikanskir ummælarar verða við.

Fyrstu ferð, navnið Guns N' Roses aftur var frammi, var í 1998, tá Axl Rose savnaði hesa manning: Robin Finck úr Nine Inch Nails á gittar, Tommy Stinson úr Replacements á bass, Josh Freese úr The Vandals á trummur og so Paul Huge og Dizzy Reed. Árið eftir hoyrdist fyrstu ferð ein nýggjur Guns N' Roses sangur »Oh My God«. Tað var í filminum End of Days.

Nú ljóðar, at Guns N' Roses koma til Norðurlond. Hin 25. juni spæla teir í Globen í Stokkholm, dagin eftir í Spektrum í Oslo og hin 28. juni rokka teir í Roskilde.

Ikki er tað uttan orsøk, at Guns N' Roses fara á drúgva konsertferð í Evropa í summar. Tað er fyri at stuðla upp undir nýggju fløguna, sum kemur í mai og hevur fingið heitið Chinese Democracy.

Konsertfyrireikararnir siga, at manningin verður Axl Rose, Robin Finck, Tommy Stinson, Buckethead og Brian Manita, nevndur Brain. Jú, soleiðis ljóða dagsins nøvn í endurreistu Guns N' Roses.

Á heimasíðunum www.gnronline.com og www.gunsnroses.com ber til at fylgja við, hvussu leikur fer og hvør skráin verður.

Guns N' Roses leingi livið – og talgilda tøknin somuleiðis.



*Axl Rose og Elton John á palli í London hin 20. apríl 1992, tá rokkstjørnur mintust Freddy Mercury. 72.000 áskoðarar vóru á staðnum og 1 milliard fólk í 70 londum sóu konsertina um fylgisvein*




*Skal tað verða rakstramáttur, so eru tær báðar Guns N' Roses fløgurnar GN'R Lies frá 1986 og Appetite for Destruction frá 1987 framúr til endamálið!*



*Axl Rose er aftur leiðari í Guns N' Roses. Nýggja fløgan eitir »Chinese Democracy« og í juni spæla teir í Norðanlondum*

**JØRGEN-FRANTZ JACOBSEN. Í samband við, at skaldið Jørgen-Frantz Jacobsen hevði 100 ára dag, setti Urd Johannesen sær fyri at fáa til vega eitt tónlistaverk. Sunleif Rasmussen hevur skriva Ferðina, sum verður frumframførd 31. mars**

# Ferðin – hásongur til ljósið

TÓNLIST
*Dagfinn Olsen*

Skaldið Jørgen-Frantz Jacobsen var føddur tann. 29. november í 1900. Hann doyði blaðungur. Tað var í samband við 100 ára dag skaldsins, at Urd Johannesen, limur í Havnarkórinum, setti sær fyri at fáa til vega eitt tónlistaverk. Slíkt er ikki løtuverk, stórt arbeiði skal í gongd, og samlaða fíggjarætlanin er eisini stór.

Urd setti seg í samband við tónaskaldið Sunleif Rasmussen, sum játtaði at skriva verkið. Hann settist at skriva í september í 1999 og verkið var liðugt í november 2000. At verkið ikki kundi framførast sjálvan 100 ára dagin, var greitt frammanundan, men nú er nærum klárt at fara á pall. Venjingar fara fram og framført verður tann 31. mars í Norðurlandahúsinum.



*Vegir krossast: Við busstøðgistaðin í Kollfjarðardali, hitti myndamaðurin Jens Kristian Vang tey bæði Sunnleif Rasmussen og Urd Johannessen. Sunnleif var ávegis til Danmarkar og Urd til Havnar. Hin 31. mars hittast tey aftur í Norðurlandahúsinum. Ikki løgið, at tiltakið nevnist »Ferðin«*

### Dámar væl tekstin

Farna vikuskiftið vitjaði tónaskaldið í Føroyum fyri at venja við Havnarkórinum. Annars hevur Ólavur Hátún vant verkið við kórinum. Jóhannes Andreasen hevur havt fylgispælið.

Vit hittu Sunleif eftir venjingina í Santa Frans Skúla í Havn leygardagin.

– Eg eri væl nøgdur við venjingina, sigur Sunleif, ið eisini sigur seg vera nøgdan við verkið.

– Eg havi roynt at arbeitt við gomlum klassiskum formum, tonaliteti, á ein nýggjan hátt. Verkið er skrivað tonalt, men hugsað á nýggjan hátt, sigur Sunleif, ið ikki dylur, at tað sleppa at skriva júst hetta verk, var eitt slag av ynskiarbeiði.

– Mær dámar væl tekstin. Tað er mestsum ein hásongur til ljósið. Verkið er í fýra satsum. 1. satsur er myrkur. Har eru bara tey lágu ljóðførini, so sum bassar, celloir, paukur og klaver. Og bassolo. 2. satsur er lyriskur, tað er alt verkið, men her lýsur hann Havnina, fólkini, lívið. Her er ein sopransolo og violin, duett. So kemur kór inn. 3. Satsur er hin longsti og er í høvuðsheitum ein tenorsolo við kórsvari. Her er vár. Hann nevnir nógv tónleik og tað er býtt upp í partar. Hann nevnir í 3. satsi Rondo Allegro. Tað er nakað, ið kemur aftur alla tíðina. Har havi eg gjørt so, at kórið nærum syngur tað sama alla tíðina í ymsum stemmum og formum. Gamli rondoformurin er frá 13-1400 talinum. Upprunaliga ein dansur, sum kom inn í klassiskan tónleik við fólkatónleikinum. Rondo merkir bara »runt«. 4. satsur er stytsti satsurin. Hetta er ein villur satsur, har er ljós, sól, veitsla og summar. Her eru sjálvsagt tey lágu ljóðførini goymd og tey høgu sleppa framat, verkið fer frá tí heilt myrka til tað heilt ljósa og hetta liggur í tekstinum, greiðir Sunleif frá.



*Plakatin til tiltakið »Ferðin«, sum er tónleikaverk eftir Sunnleif Rasmussen. Yvir øllum sveimar Jørgen Frantz Jacobsen. Atgongumerki fáast í Norðurlandahúsinum, í Kunningarstovuni og í Kiosk Vár, frá mánadegnum*

### Ferðin

Og her hómast eisini heitið á verkinum.

– Tað er ein ferð frá myrkri til ljós. Sjálv yrkingin, teksturin, eitur Nýggjársouvertura. Jørgen-Frantz hevur skrivað hetta á nýggjárinum og sent til William Heinesen. Tað kundi eg ikki nýta sum heiti. Ouvertura merkir forspæl og tað er Ferðin ikki. Tað er uppá einar 35-40 minuttir. Eg mátti finna annað heiti og orðið »ferð« er ofta nevnt, sigur Sunleif Rasmussen.

### Tónakendur tekstur

Teksturin eftir Jørgen-Frantz Jacobsen í bókini Dýrmæta Lív hellur seg nógv at tónleiki. Yvirskriftir eru, sum t.d. Andante og Rondo Allegro. Eisini verður ofta greitt frá við tónlistarligum myndum. Hevur hetta verið ein vansi ella fyrimunur, tá Ferðin skuldi skrivast?

– Teksturin er tónleikur! Ein fær hugskotini beinanvegin, so tað er ein stórur fyrimunur. Tá ein hevur ein tekst, so er ein altíð eitt sindur bundin, tí har er altíð okkurt givið frammanundan. Skrivar ein instrumentaltónleik, so má ein hugsa fleiri ting sjálvur, sigur Sunleif.

– Eg fekk nógv latið upp í hendurnar, við at lesa Dýrmæta Lív. Millum annað sigur hann einastaðni (Blaðs. 78, blðm.), at hann er í Haldarvík, og hoyrir vindin blæsa í ein krana. Burturúr fær hann eitt lag hjá Schubert, nevnt Standshen. Tað eru sjey tónar og hesar brúki eg, sigur Sunleif og leggur afturat, at sum heild nýtir hann í Ferðini lítið av tónatilfari, men tað sum er, verður nýtt í ymsum formum.

– Hetta fekk eg upp í hendurnar, men umframt fekk eg ymsar lýsingar. T.d. tá Jørgen-Franrz skrivar Barbaru. Tá skrivar hann til William, at hann hevur nógv hugskot, men holdið er veikt. Men hann skrivar hetta musikalskt. Hann sigur, at sinnið er sum villir blásarar, men likamið er sum sorgnar violinir. Hetta nýti eg gjøgnumgangandi í verkinum, sigur Sunleif Rasmussen um Ferðina, sum er skrivað soleiðis, at teksturin kann syngjast bæði á føroyskum og donskum, sum jú var skrivimálið hjá Jørgen-Frantz.

### Stórt verk

Tann 31. mars verður Ferðin framførd. Dirigentur verður Bernharður Wilkinson, ið eisini stjórnaði, tá fyrsta føroyska symfoniin varð framførd. Hana hevði Sunleif eisini skrivað. Dirigenturin verður í Føroyum í eina viku undan konsertini, so hann kann venja við sangarum og tónleikarum.

Umframt Havnarkórið, koma 55 sangarar úr Íslandi. Har eru tvær føroyskar kvinnur við, ið eisini taka sær av at arbeiða við føroyska tekstinum.

Føroya Symfoniorkestur spælir verkið. Eini 35 føroyskir tónleikarar eru og eini 25-30 koma úr Danmark. Grundstamman er sostat Føroya Symfoniorkestur.

Solistar eru Joanna Johansen, sopran, Ernst Sondum Dalsgarð, tenor og Eiríkur Hreinn Helgason úr Íslandi, bass.

### Gongur strúkandi

Sunleif hevur úr at gera.

– Dagin eftir framførsluna í Norðurlandahúsinum fari eg til París, har ein onnur frumframførsla er av einum av mínum verkum 2. apríl. Hetta er fyri solosaxofon og elektronikk. Ein stór messa er í París og franski parturin av mínum forlag ætlar at promovera mín tónleik. Ein bílegging er longu komin afturat úr Fraklandi frá einum fronskum ljómliði, sum eg skal skriva til næsta ár. Í løtuni skrivi eg eitt verk, eina strúkikvartett, til nakrar slovakar, sum koma til Føroya í summar og frumframførslan skal vera tann 24 juni á einum so eksotiskum stað sum við Gjógv, greiðir Sunleif frá.

– Eg skal eisini vera eitt av trimum høvuðsnøvnum á einum musikkfestivali í Odense, Musikhøst, í november. Odense Symfoniorkestur hevur í tí sambandi bílagt eina saxofonkonsert, sum eg skal skriva í vár og í summar. Musikhøst er ein hin størsti festivalurin í Danmark fyri nýggjan tónleik, sigur Sunleif, ið sum skilst hevur nógv jørn í eldinum.

### Dreymurin

Sunleif og familjan hava nú búð í Danmark í 13 ár, men Sunleif dylir ikki, at dreymurin er at flyta aftur til Føroya einaferð og at tey hava spælt við hesa hugsan, men einki ítøkiligt er tó enn á hesi leið.

– Eg kann skriva mín tónleik allastaðni. Eg eri komin á eitt forlag, SUD, ið tekur sær av at selja mín tónleik. Forlagið var, og er, danskt, men hevur í dag nógvar samstarvsfelagar í mongum londum. Forlagið hevur voksið seg stórt, tað hevði nógv af partiturunum hjá Carl Nielsen, og hevur m.a. vunnið pening uppá hesi, greiðir Sunleif frá henda seinnapartin, vit sita í gomlu kirkjuhølunum í Santa Frans Skúla, har venjingar eru farnar fram.

Og Sunleif er væl nøgdur við verk og við venjingarnar og gleðir seg til frumframførsluna av Ferðini tann 31. mars og hann kann ikki lata vera við at nevna stigtakaran.

– Eg haldi, at tað er flott, at Urd Johannesen hevur tikið stig til hetta og hevur fingið hetta at hanga saman. At hon hevur fingið hugskotið og hevur gjøgnumført tað, sigur Sunleif Rasmussen, tónaskald.

## Ferðin

– fíggjarætlan og stuðlar

*Fíggjarætlanin er 750.000 kr.*

*Stuðlarnir eru:*
Nordisk Kulturfond (250.000)
Norðurlandahúsið (sum stendur sum fyriskipari og »karmur« heldur enn beinleiðis stuðul)
Tórshavnar Býráð
Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Mentunargrunnur Landsins
FITUR
Tórshavn-Reykjavík-Nuuk
Kodas Kollektive Båndmidler
Statens Musikråd
Dansk-færøsk kulturfond

Og vælvild annars frá nógvum øðrum pørtum, sum eru við í ætlanini, t.d. Atlantic Airways og Smyril Line.

Tiltakið verður fyriskipað saman við Føroya Symfoniorkestri og Norðurlandahúsinum.